## Seigpíning av skipaeigarum

Á framløgufundinum hjá grannskoðarafelagnum Rasmussen & Weihe um fiskiskipaflotan, helt Jónsvein Knudsen, útgerðarmaður fyri, at samfelagnum tørvar ein grunn, sum kann hjálpa monnum burtur úr fiskiskipavinnuni. Hann vísti á, at í summum førum er grundarlagið undir rakstrinum hjá ávísum skipabólkum alt ov veikt. Í hesum sambandi sipaði hann til, at fiskidagarnir, sum hesi skip og bátar hava, eru alt ov fáir. Hann vísti á, at tað eru trolbátar, sum eiga færri enn 100 fiskidagar, sum hvørki eru av liva ella doyggja av. – Hetta er seigpíning av vinnuni, sum hann tók til. Jónsvein Knudsen helt tí, at ein grunnur langt síðan átti at verið skipaður, har fiskivinnan og tað almenna rindaðu eina ávísa upphædd inn um árið. – Ein slíkur grunnur kundi so verið við til at hjálpt monnum, sum hava eitt ov veikt grundarlag undir sínum fiskifari, burtur úr aftur vinnuni, segði hann.



*Jónsvein Knudsen*



# Okkum tørvar eitt universitet

**Eitt av aðalendamálunum hjá SamVit er at hjálpa íverksetarum í gongd. Men tørvur er á einum universiteti, sum hevði verið gull vert fyri vitanar íverksetarar**

ÍVERKSETAN
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

TK-stovan var ein undangongu stovnur sum umvegis menningarstovuna nú er samansjóðaður við nýggja stovnin SamVit.

Fremsta málið hjá hesum stovni var og er framvegis at hjálpa íverksetarum í gongd, at gera hugskot til veruleika.

TK-stovan varð sett á stovn í kreppuárunum í 1990-unum, júst við tí endamáli at hjálpa ungum fólki við góðum hugskotum. Og tey eru ikki so fá, sum hava vitjað tá TK-stovuna, nú SamVit.

- Tá talið var upp á tað mesta, vóru heili 170 fólk í sambandi við okkum tað eina árið, sigur Tummas í Dali, sum starvast á Menningardeildini á SamVit.

Tey royna fyri tað mesta at taka sær av vitanar íverksetarum, tí orkan er avmarkað og tí royna tey at fokusera upp á vinnur, sum hava størst samfelagsligt gagn.

- Tá eru vitanar íverksetarar teir, sum hava størsta potentiali, tí tá er ofta talan um eina nýggja framleiðslu, ofta innovativt nýtt, sum beinanvegis kann stíla móti øllum heiminum sum marknað, sigur Tummas í Dali.

Tað hava verið eldsálir, sum hava gjørt eina rúgvu fyri føroysk innovativt vinnulív, ikki minst Tormóður Dahl. Hann kallaði íverksetarar fyri finn-uppá menniskju, og hann skipaði fyri hugskotskappingum fyri at skapa nýggjar vinnur, sigur Tummas í Dali.

Ein onnur slík eldsál er Kjartan Kristiansen, stjóri á Menningarstovuni.

### Klekingardepil

Tað er næstan dagliga, at fólk venda sær til SamVit við hugskotum, og tá tað hendir, verður hugskotið tosað ígjøgnum.

- Men vit hava okkara avmarkingar. Vit kunnu eitt nú ikki fara í beinleiðis kapping við teir privatu um at ráðgeva fólki, men vit gera so nógv sum vit kunnu, sigur Tummas í Dali.

Men íverksetan nýtist ikki bara at vera genial hugskot, sum miða ímóti øllum heiminum sum marknað.



*Tummas í Dali starvast á menningardeildini hjá SamVit*

SamVit er jú serliga kent sum ferðavinnustovnur, og har fáa tey alla tíðina impulsir uttanífrá.

- Ein trend beint nú er upplivingarferðir, og har er tað ein avbjóðing at fáa fólk at skapa ein ídnað innan slíkar ferðir. Til dømis kann nevnast, at havfisking er ógvuliga væl umtókt, og nú hava báteigarar tikið seg saman at stovna felag, sigur Elin Heinesen, stjóri á SamVit.

Hetta er eisini dømir um íverksetan og Elin Heinesen nevnir, at tað hevði borið til at skapt aðrar upplivingarferðir, eitt nú kaving ella fjallaklintring.

Fyri at nýggjar fyritøkur skulu fáa bestu umstøður at starta upp, hevur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, tikið stig til ein klekingardepil, har nýggjar fyritøkur kunnu læra av øðrum fyritøkum, sum longu hava verið ígjøgnum byrjunartrupulleikarnar. Men fyri at sleppa við í klekingardepilin er tað ein treyt, at fyritøkurnar hava allan heimin sum marknað.

- Í løtuni eru tríggjar fyritøkur í klekingardepilinum við fimm fólkum, og tvær aðrar umsóknir liggja, sum ikki eru viðgjørdar enn, men sum eru áhugaverdar, sigur Tummas í Dali.

### NOPEF stuðlar

Menningardeildin hjá SamVit samstarvar við nógvar stovnar og fyritøkur. Ein teirra er NOPEF, sum er stovnur, ið stuðlar fyritøkum at flyta sítt virksemi til lond uttanfyri ella í útjaðaranum av ES.

NOPEF er inni í fimm føroyskum fyritøkum, sum ætla at flyta ella starta upp framleiðslu í baltisku londunum og eystureuropa.

Hetta eru tiltøk, sum SamVit samskipar.

Eitt annað, sum SamVit skipar fyri, er at íverksetarar kunnu fáa atgongd til eina databasu, sum veitir upplýsingar um ávísar marknaðir og marknaðarviðurskifti, og tað kann vera hvat sum helst, eisini kreativar vinnur so sum tónleik.

Umframt hetta er SamVit eisini ferð við at starta ein íverksetaraportal, har basisráðgeving fæst. Hesin portalur er gjørdur saman við eitt nú Vinnuhúsinum, bankunum, Íverksetanarhúsinum í Klaksvík og øðrum áhugaðum.

Eisini hava teir ment eitt business-game av sama slagi sum oljuspælið, og tað er sama fyritøka sum hevur ment hetta spælið, nevnt Start-Up.

Men tað, sum Tummas í Dali metir vera mest umráðandi, er at vit fáa eitt universitet, sum kann birta upp undir hjá íverksetarum.

fjør – 2006 – mistu europeiskar fyritøkur 90 milliardir evrur, ella umleið 660 milliardir krónur.

Bara fyrsta ársfjórðing í ár eru fleiri enn 30.000 persónar farnir av knóranum í Onglandi, og hetta er fyrst og fremst orsakað av ovurnýtslu og kredittkeypi.

Gjaldsvanarnir eru ein triðingur búskaparligar umstøður og tveir triðingar lógarkarmar. Men mest umráðandi er stýring av skuldarum. Kanningar vísa eisini, at skuld uttan trygd, eitt nú kredittkort, er í støðugum vøkstri í Europa. Í 2005 var hendan skuldin í Europa heilar 7 trilliardir (7000 milliardir).

# Jarðfeingi ikki mist mótið



*Petur Joensen, stjóri á Jarðfeingi heldur ikki áhugin minkar fyri tað at útbjóðing má bíða*

**-hóast valið útsetur bæði 3. útbjóðing og dupultskattaavtalu**

OLJUTILGONGD
*Jan Müller*
*Jan@sosialurin.fo*

- Tað var sera spell, tí tað var komið so langt. Men tað mugu vit bara taka til eftirtektar, og so mugu vit síggja, hvat nýggju tinglimirnir hava at siga. Hetta sigur stjórin í Jarðfeingi, Petur Joensen, nú útskrivingin av løgtingsvalinum gjørdi, at bæði uppskotið til 3. útbjóðing at leita eftir olju og gassi á landgrunninum og at seta í gildi dupultskattaavtaluna millum Føroyar og Bretland, blivu útsett.

Stjórin á Jarðfeingi heldur ikki, at hetta fer at skapa trupulleikar og minka áhugan fyri at leita eftir olju og gassi á landgrunninum. Hann fellur so avgjørt ikki í fátt.

Spurningurin er so, heldur hann fyri, hvussu long tíð gongur til at skipa nýggja samgongu. -Helst eru vit í apríl til uppskotið um 3. útbjóðing kann góðkennast í tinginum. Vit tosa so helst um august, tá umsóknirnar skulu vera inni og so verða loyvini latin seint á sumri 2008. Petur Joensen heldur ikki, at hetta fer at seinka útbjóðingina. Hetta veldst eisini um, hvussu fer at ganga hjá BP við boringini á landgrunninum og hjá Chevron hinumegin markið.

Dupultskattaavtalan við Bretland verður eisini órógvað ella seinkað orsakað av valinum. Men Petur Joensen heldur ikki, at hetta nýtist at órógva so nógv. Hinvegin er hetta ikki eitt mál hjá Jarðfeingi men meira eitt mál fyri Fíggjarmálaráðið.

Sosialurin skilur annars, at útlendsk oljufeløg, sum ikki í løtuni eru virkin í leitingini við Føroyar, vísa áhuga fyri at keypa seg inn í leitiloyvi á landgrunninum. Stjórin á Jarðfeingi hevur tó onga viðmerking um hetta. Hann sigur tó, at Jarðfeingi arbeiðir við áhugaverdum málum, sum hava atlit til leiting.